# Rokan í fjøruni

**Hesa vikuna bjóðar Náttúrugripasavnið børnum og vaksnum til serstakan heystfagnað. Tiltakið hevur stóran áhuga, og fyrrapartin í gjár høvdu omanfyri 150 fólk vitjað framsýningina**

NÁTTÚRA
*Snorri Brend*

**Heystfagnaður:** – Eg haldi at nakrir av hesum steinunum eru ordiliga flottir!

Við eitt glasborð standa tvær gentur og loysa nakrar uppgávur. Hesar uppgávurnar eru um føroyskar steinar.

Hanna Vang og Rakul Maria Hjalmarsdóttir Tórgarð standa við penni í einu hondini og einum arki við spurningum í hinari.

Tær skulu finna fram til, hvussu tey ymisku sløgini av steinum eita. Í glasborðinum standa fleiri vakrir steinar, og nú skal navn setast á.

– Hetta er ein kalsitt, siga tær báðar við blaðmannin, sum um hetta var ein sjálvfylgja fyri tær.

Henda uppgávan er nú loyst, og nú bíða fleiri aðrar uppgávur eftir teimum. Tær hava funnið fram til nøvnini á fimm steinum.

–- Kom, skunda tær. Nú mangla vit bara nøvnini á tveimum aftrat, sigur 9 ára gamla Rakul Maria við 10 ára gomlu vinkonuna, Honnu.



*Bæði stórt og smátt er at síggja á framsýningini. Henda gentan er lítil í mun til stóra hvalin*



*Rakul Maria Hjalmarsdóttir Tórgarð (vm) og vinkona hennara Hanna Vang hava funnið fram til navnið á tí fimta føroyska steininum. Hetta er ein góður háttur at læra meiri um føroysku náttúruna*

## Góð undirtøka

Tað er ikki at taka seg aftur í, at hesin heystfagnaðurin er væl umtóktur millum bæði børn og vaksin.

Inni í framsýningarhøllini er ein øgilig málageipan frá spentum børnum, sum nema sær kunnleika um tað, sum finst millum fjals og fjøru, og um tað sum hevur veingir.

Hetta er ein hentur háttur at læra børnini um tað, sum finst í føroysku náttúruni. Júst hetta var eisini ein av fyrimununum hjá Honnu og Rakul Mariu, sum enn ikki høvdu lært so nógv um føroysku steinsløgini í skúlanum.

– Tað er gott at fáa meiri at vita um hetta, og so er tað eisini sera spennandi, siga tær báðar við ein munn.

Tað eru kortini ikki bara tær sum fegnast um hetta. Frá mánadegi til hósdagin vóru íalt 1006 fólk á framsýningini, harav 694 teirra vóru børn.

Fyrrapartin í gjár lat framsýningin upp kl. 11, og tá vit vitjaðu framsýningina um hálvgum tólv tíðina høvdu íalt 147 fólk vitjað har.

Tað streymaði alla tíðina inn við børnum og vaksnum, og tí er lítil ivi um, at tað verður eitt rættiliga stórt tal sum vitja, áðrenn dyrnar lótu aftur kl. 16.

Aftur í dag er møguleiki at vitja framsýningina, sum verður opin frá kl. 11 til 16. Í fjør vitjaðu 1915 fólk framsýningina, og av hesum vóru 1289 børn.


